Sirið Stenberg
løgtingsmaður

Nr. 25/2020

Fyrispurningur eftir Tingskipanini §52 a

Fyrispurningur um óstøðugu siglingina hjá Smyrli, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

1. Metir landsstýrismaðurin, at støðan á Suðuroyarleiðini er nøktandi, nú tað er so trupult at halda ferðaætlanina?
2. Eru nakrar ætlanir um at gera nakað við støðuna?
3. Er ætlanin at fáa nakrar farmatúrar sigldar t.d. um náttina, møguliga við øðrum skipi?
4. Er nøkur ætlan at økja um túratalið hjá Smyrli og at betra um tænastuna?

Viðmerkingar:
Seinastu tíðina hevur siglingin hjá Smyrli verið óstøðug, og tað hevur verið sera trupult at hildið ferðaætlanina. Tað hevur verið meira reglan enn undantakið, at ferðaætlanin ikki hevur hildið, serliga tá líður út á dagin. Hetta er til alstóran ampa fyri ferðafólk. Tað eru nógv fólk, sum ferðast regluliga í arbeiðsørindum, sum ganga í skúla og arbeiða norðanfjørðs, sum skulu um fjørðin í læknaørindum og líknandi.
Smyril er einasta farleið hjá suðringum og at meta sum okkara lívsæðr. Tað er tí bæði óliviligt og darvandi fyri bæði fólk, trivnað, vinnulív o.o., um farleiðin er óstøðug. Tað ber snøgt sagt ikki til í dagsins samfelag.
Ferðavinnan, og harvið eisini ferðafólkatalið, er vaksandi, so tað tykist ikki vera nakar ivi um, at eftirspurningurin eftir støðugum og nøktandi ferðasambandi, og tænastum sum heild, bara fer at økjast.
Smyril er eisini eitt arbeiðspláss og stóra arbeiðstrýstið kann hugsast at hava týdning fyri arbeiðsumhvørvið. So heldur ikki fyri starvsfólkini kann støðan vera nøktandi.
Vit hava fingið at vita, at metnógvur farmur hevur verið førdur um Suðuroyarfjørð og at hetta er høvuðsorsøkin til seinkingarnar.
Tað er umráðandi at fáa at vita, hvat ítøkiliga verður gjørt fyri at bøta um karmarnar fyri siglingina til Suðuroynna, tí tað hevur so stóra ávirkan á lokalsamfelgið og fólkið, sum har býr. Tí hesir spurningar til landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Á Løgtingi, 29. september 2020

Sirið Stenberg